gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Samgongumøguleikar

Tað er óvanligt, at flokkar í Føroyum avdúka, hvørjar aðrar flokkar teir helst vilja samstarva við eftir eitt val. Nú eru samgongumøguleikar eftir løgtingsval eisini rættiliga ringir at forútsíggja, tí bert eitt mandat kann broyta alla myndina. Nógv kann sjálvandi broytast til mai í næsta ár, men sum støðan er í løtuni kann ikki roknast við, at samgongan fer at fáa neyðugu 17 tingmenninar. Helst fara Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin at ganga aftur, meðan Tjóðveldisflokkurin helst fer at standa í stað ella fáa eina framgongd, um vit ímynda okkum, at partur av teimum meira fullveldissinnaðu fólkafloksveljarunum fara yvir í Tjóðveldisflokkin. Um seinasta takið hjá Kallsberg at seta Tjóðveldisflokkin uppá pláss hevur forðað fyri hesum útviklingi er ilt at siga. Spurningurin er so eisini, um roknast kann við, at ríkisfelagsfólkafloksveljarar fara yvir í Javnaðarflokkin til eitt komandi val.

Fær samgongan sínar 17 tingmenn fer hon so at halda fram? Hava Breckmann, Niclassen og Djurholm hug til enn ein skeið saman við Tjóðveldisflokkinum, sum eisini eftir komandi val av veljarum sínum kann blíva tvingaður til at leggja seg meira til vinstru enn hann hevur gjørt. Neyvan. Hvat við Sjálvstýrisflokkinum! Verður hann tungan á vágskálini kann tað tá hugsast, at hann heldur vil vera klípið í eini aðrari samgongu! Neyvan man Helena hava serliga høgar tankar um løgmann eftir, at hon mátti fara frá!

Hvussu tá við Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum! Fer kemiin at vera betri millum Lisbeth og Jóannes enn millum Edmund og Jóannes? Og fer sjálvstýrispolitikkurin hjá Lisbeth at leggja seg meira uppat tí hjá Javnaðarflokkinum? Sambandsflokkurin hevur annars á skrift førkað seg frá gomlu sambandskósini. Tað sær tí ikki mætari út enn at flokkarnir allir hava nærkast tí miðju, sum Javnaðarflokkurin nú stendur sum størsti eksponentur fyri. Og tað kundi tí sæð út til, at Javnaðarflokkurin kemur í eina lyklastøðu eftir komandi val. Men tað krevur, at flokkurin framhaldandi fær viðvind í veljarakanningum og at flokkurin markerar seg meira. At hann er opin – at hann fylgir sínum egna sjálvstýrisuppskoti, og tað merkir, at samtíðis sum hann tekur undir við parti av tí, sum samgongan hevur skotið upp, eisini syrgir fyri at krevja ávísar broytingar í hesum uppskoti. Vil landsstýrið ikki ganga honum á møti í hesum hevur hann einki annað at gera enn at marknaðarføra sína egnu sjálvstýrislóg.

Komandi val kann koma Tjóðveldisflokkinum aftur um brekku. Lorar hann ikki meira út verður torført hjá honum at finna samstarvspartnarar. Eftir seinasta val fekk Javnaðarflokkurin Svartaper. Hann kann lættliga enda í hondunum á tjóðveldismonnum eftir næsta val!

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

**Tórfinn Smith 55 ár**



Í gjár fylti Tórfinn Smith, býráðslimur í Havn, 55 ár.

Tórfinn hevur sítt dagliga yrki á marknaðardeildini hjá Dimmalætting.

Hann hevur drúgvar royndir innan blaðyrkið, hóast hann byrjaði sum veðurmaður og seinni starvaðist sum postmaður, so gjørdist hann ungur – einans 22 ára gamal – blaðstjóri á Sosialinum. Hetta var í november í 1968, tá Villi Sørensen og Jákup Lindenskov, sum í felag røktu blaðstjórastarvið, gjørdust landsstýrismenn, tá Petur Mohr Dam doyði.

Tórfinn Smith er sonur Charles og Petru Smith. Hon úr Havn og hann úr Vági. Tórfinn er mest kendur sum blaðmaður, men í 1984 varð hann valdur í Tórshavnar býráð, umboðandi Javnaðarflokkin.

Tey fyrstu árini sat hann í andstøðu, og var atfinningarsama rødd hansara ofta at hoyra, tá Fólkaflokkurin og Poul Michelsen ráddu fyri borgum í Havn.

Við undantaki av tveimum árum, so hevur Tórfinn sitið í Tórshavnar býráð síðani 1984. Tvey tey seinastu valskeiðini hevur hann sitið í samgongu, og hevur hann verið formaður í býráðsins havnarnevnd, nú aftur stórar útbyggingar eru farnar fram.

Fyri eini 5-6 árum síðani gavst Tórfinn Smith sum blaðmaður og fór í starv hjá Starvsmannafelagnum, har hann m. a. legði til rættis limablaðið hjá Starvsmannafelagnum og skipaði fyri skeiðum fyri limir felagsins. Seinastu tvey árini hevur Tórfinn Smith starvast á Dimmalætting.

# Blásaratrio við Jógvani, Andreu og Kára

**Í annaðkvøld skipar Orfeus, tónleikafelag Norðurlandahúsins, fyri konsert**

TÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*



Í annaðkvøld, hóskvøldið, kl. 19.30 verður so aftur ein konsert við Orfeus, tónleikafelag Norðurlandahúsins. Tað er ein føroysk blásaratrio, ið er mannað við tónleikarunum Andreu Heindriksdóttir, floyta, Kári Bæk, obo og Jógvan Zachariassen, fagott.

Tey hava øll fingist við tónleik í mong ár. Jógvan og Andrea spæla saman í Aldubáruni, og Kári er eisini burturav eitt av okkara ídnastu tónaskaldum, at vit kenna hann sum oboleikari.

Tey hava áður spælt saman í øðrum høpi, eitt nú hava tey spælt í Føroya Symfoniorkestri og eitt stutt skeið í 80'unum í einari blásarakvintett.

Nú tey øll búgva í Føroyum, hava tey gjørt av at royna at taka uppaftur hesa trio.

Tað, tey fara at spæla í annaðkvøld, eru verk eftir Haydn, Britten, Kára Bæk, Beethoven og fleiri onnur.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.





